


## POLITISKA STØÐAN TVEIR MÁNAÐIR EFTIR VALIÐ



*Mynd 1. Bjarni Benediktsson (v.m.) og Guðni Th. Jóhannesson, forseti Íslands.*

Dagin fyri gamlaárskvøld gav forsetin, Guðni Th. Jóhannesson formanninum í Sjálfstæðisflokkinum, Bjarni Benediktsson (21 altingslimir), fyri aðru ferð, heimildina at skipa stjórn. Frammanundan hesum hevði Bjarni havt óformligar samrøður við formenninar í Viðreisn (7) og Björt framtíð (4) – Benedikt Jóhannesson og Óttarr Proppé. 2. januar møttust floksformenninir aftur og hava avrátt at leggja komandi formligar samráðingar til rættis. Hesir tríggir flokkar hava 32 altingslimir tilsamans, ið er minsti meiriluti, av teimum tilsamans 63 altingslimunum.

> *»Viðreisn og Björt framtíð, sum hava valt at samráðast saman, hava verið við í øllum 4 royndum at skipa samgongu. Enn hevur tað ikki eydnast. Nógv bendir á, at tað fer at eydnast nú«*

Samstundis hevur Sigurður Ingi Jóhannssson, formaður í Framsóknarflokkinum (8) og Katrín Jakobsdóttir, formaður í Vinstri grønum (10) havt samrøður um møguleikarnar fyri, at fara í samgongu saman við Sjálfstæðisflokkinum. Hesir tríggir flokkarnir hava 39 altingslimir aftanfyri seg.



*Mynd 2. Óttarr Proppé (v.m.), Bjarni Benediktsson (m.f.), Benedikt Jóhannesson (h.m), sum í løtuni samráðast um at skipa samgongu.*

Hóast Sjálfstæðisflokkinum er í samráðingum við Viðreisn og Björt framtíð, so kann flokkurin koma í eina lyklastøðu, um Framsóknarflokkurin og Vinstri grønir kunnu finna saman. Men Sjálfstæðisflokkurin hevur áður havt samrøður við Vinstri grønar, men tá var ikki grundarlag fyri samstarvi.

Formaðurin í Sjálfstæðisflokkinum, Bjarni Benediktsson, hevur áður havt samgongutingingar við Viðreisn og Björt framtíð, men tá slitnaðu samráðingarnar m.a. upp á fiskivinnupolitikkin, landbúnaðarpolitikkin og fólkaatkvøðu um framhald við tingingum við ES. Tá helt Bjarni eisini, at meirilutin var ov tepur og tí vildi hann hava Framsóknarflokkin við eisini, men tað vildu hinir báðir flokkarnir ikki hoyra talan um. Men nú sær út til, at hesir flokkarnir eru komnir væl longri í samráðingunum enn seinast. Komið er so mikið langt, at ein samgonga millum Sjálfstæðisflokkin, Viðreisn og Björt framtíð er í eygsjón.

Hinvegin, so er Viðreisn sprottin úr Sjálfstæðisflokkinum, tí hann er ónøgdur við fiskivinnu- og landbúnaðarpolitikkin, eins og við ES-politikkin hjá Sjálfstæðisflokkinum. Skulu flokkarnir semjast um eitt samgonguskjal, so skulu

báðir flokkarnir geva seg – kanska meira enn allir altingslimirnir í báðum flokkunum kunnu ganga við til. Tí er tað neyvan ein løtt telving, sum Bjarni skal loysa, um hesir flokkar skulu ganga í samgongu saman. Skuldu flokkarnir komið ásamt um eitt samgonguskjal, so er ikki óhugsandi, at hesi viðurskifti hjá flokkunum báðum koma at geva ávísar avbjóðingar komandi smáu 4 árini.

Um tað ikki eydnast Sjálfstæðisflokkinum, Viðreisn og Björt framtíð at koma ásamt um eitt samgongusamstarv, so er spurningurin um Sjálfstæðisflokkurin skuldi funnið saman við Framsóknarflokkin og Vinstri grønar.

Um eingin av hesum møguleikum fer at eydnast, so má nokk roknast við, at nýval verður, tí minnilutastjórn er óvanlig í Íslandi.

## STUTT UM FLOKSFORMENNINAR Í FLOKKUNUM, SUM SAMRÁÐAST

***Bjarni Benediktsson - Sjálvstæðisflokkurin***

Bjarni hevur verið limur í Altinginum síðani 2003, tá hann varð valdur inn fyri Sjálfstæðisflokkin í Suðurvestur valdøminum. Hann hevur verið fíggjar- og búskaparráðharri síðan 2013.



*Mynd 3. Bjarni Benediktsson, 46 ár, sum verður forsætisráðharri í nýggju samgonguni, sum væntandi verður skipað heilt skjótt.*

Hann varð føddur tann 26. januar í 1970 í Reykjavík og er sonur Benedikt Sveinsson, sakførara og Guðríður Jónsdóttir, húsmóður.

Hann fekk bachelorprógv í løgfrøði úr Háskólanum í Reykjavík í 1995, las týskt og løgfrøði í Týsklandi frá 1995-1996, tók masterprógv í løgfrøði í Miami í 1997, og ríkisgóðkendur virðisbræva seljari í 1998. Bjarni arbeiddi sum løgfrøðingur hjá Eimskip frá 1997 til 1999, og við egnum virki frá 1999 til 2003, tá hann bleiv valdur inn á ting. Hann hevur verið formaður í Sjálfstæðisflokkinum síðan 2009.

***Benedikt Jóhannesson – Viðreisn***

Benedikt Jóhannesson hevur verið limur í Sjálfstæðisflokkinum, men hevur ongantíð verið valdur inn á ting fyri flokkin. Er fyrstu fer valdur inn á ting í 2016 fyri Viðreisn í Norðureystara valdømi. Benedikt stovnaði Viðreisn í mai 2016, og er formaður floksins.



*Mynd 4. Benedikt Jóhannesson, 61 ár, verður nevndur sum komandi fíggjarmálaráðharri.*

Hann varð føddur tann 4. mai 1955 og er sonur Jóhannes Zoëga, fyrrverandi stjóra í fjarvarma felagnum í Reykjavík, og Guðrún Benediktsdóttir, húsmóður. Benedikt fekk bachelor prógv í støddfrøði og búskaparfrøði í 1977 úr universitetinum í Wisconsin. Síðan fekk hann master prógv í hagfrøði frá Florida State University í 1979. Hereftir hevur hann lokið doktara prógv í hagfrøði og støddfrøði frá sama universitetið í 1981.

Benedikt var lærari á handilsskúlanum í Reykjavík frá 1982-1986. Í 1994 stovnaði hann sítt egna ráðgevingarfelag Talnakönnun, sum hann hevur verið stjóri í síðan. Hann hevur eisini verið stjóri í útgávufelagnum Heimur, síðan 2000. Annars hevur hann verið limur og stjórnað fleiri fyritøkum, nevndum og ráðum.

***Óttarr Proppé – Björt Framtíð***

Óttarr Proppé hevur verið limur í Altinginum síðan 2013, tá hann bleiv valdur inn fyri Björt Framtíð í Suður Reykjavíkar valdøminum. Hann hevur verið í

formansskapinum hjá Altinginum frá 2013-2015, og hevur verið limur í uttanríkisnevndini síðan 2013.



*Mynd 5. Óttarr Proppé, 48 ár, verður nevndur sum møguligur komandi mentamálaráðharri.*

Hann varð føddur 7. november í 1968 í Reykjavík og er sonur fyrrverandi rektaran á læraraskúlanum, Ólafur J. Proppé, og Pétrún Pétursdóttir, fyrrverandi stjóra á listasavninum Hafnarborg. Óttarr fekk studentsprógv í 1986 í USA. Hann hevur arbeitt við bókasølu hjá Eymundsson og Máli frá 1987-2010. Hann hevur eisini arbeitt við tónleiki og er tónasmiður. Í hesum sambandi hevur hann eisini verið í leiðsluni hjá STEF síðan 2008, eitt felag sum arbeiðir við tónleika rættindum, og savnar inn pening teirra vegna. Óttarr hevur sitið í býráðnum í Reykjavík frá 2010-2013, tá hann bleiv valdur inn á ting.

## HVÍ TEKUR TAÐ SO LEINGI, AT SKIPA SAMGONGUR Í ÍSLANDI?



*Mynd 6. Altingið.*

Í Íslandi hava tað sum oftast verið tveir flokkar ella fleiri, sum hava skipað samgongu. Eingin flokkur hevur einsamallur fingið meiriluta í Altinginum. Um ein samgonga missir meirilutan eftir eitt val, so kann tað taka nakað av tíð, at skipa eina nýggja samgongu. Hóast hetta, so heldur gamla samgongan fram, sum ein starvsstjórn til ein nýggj samgonga tekur við. Starvsstjórnir er vanligar í íslendsku politisku skipanini. Ísland hevur langa siðvenju fyri meirilutastjórnum.

Tað er bert hent einaferð áður, at Altingið er kallað saman uttan at ein samgonga er skipað. Tað var fyri júst 37 árum síðani, í desember 1979. Ikki fyrr enn 8. februar 1980 – 66 dagar eftir valið – eydnaðist tað at skipa eina samgongu. 3. januar 2017 eru tað júst 66 dagar síðani valið varð á hesum sinni. Tað er einki óvanligt í Íslandi, at skipan av samgongu tekur 2 til 3 mánaðir. Til dømis í tíðarskeiðinum 1971 til 1991 var meðal tíðin at skipa samgongu 54 dagar ella um 8 vikur. Í 1987 tók tað 77 dagar, at skipa eina samgongu.

Møguliga skal orsøkin til hetta finnast í mentanini í Altinginum. Síðan skipan av flokkum í Altinginum fyrst í 1930-árunum, hevur flokkaskipanin verið býtt í eina samgongu og eina andstøðu. Hesin samanbrestur sæst einamest aftur í ovurlangar røður ("*Filibustering*", sum tað nevnist á enskum), sum eru til ampa í tingviðgerðini. Hetta duga allir flokkar líka væl, alt eftir um teir eru í samgongu ella andstøðu. Samstarv millum samgongu og andstøðu kemur so at siga ikki fyri.

Hóast hetta, so sita altingslimirnir ikki saman í flokkum í altingssalinum, sum vit vanliga kenna tað frá øðrum parlamentum, men lutur verður kastaður um, hvar hvør einstakur tinglimur skal sita. Tí eru altingslimirnir spjaddir runt í altingssalinum. Hetta verur gjørt fyri at fremja samstarvið millum altingslimirnar.

Um tíðin síðan valið og neyðuga samstarvið um fíggjarlógaruppskotið, sum varð samtykt í desember, hevur blíðkað altingslimirnar, so teir eru meira sinnaðir til at fara inn í samgongusamstarv, fer tíðin at vísa.

## ALTINGIÐ SAMTYKT FÍGGJARLÓGINA FYRI 2017



*Mynd 7. Íslendska fíggjarlógaruppskotið fyri 2017.*

Hóast tað bert er ein starvsstjórn, sum hevur virkað síðan valið 29. oktober, so skal ein fíggjarlóg leggjast fyri Altingið og samtykkjast fyri árslok. Starvsstjórnin legði uppskot fyri Altingið 6. desember. Fíggjar- og fíggjarætlanarnevndirnar vórðu valdar í Altinginum í hesum sambandi, at viðgera uppskotið til fíggjarlóg fyri 2017.

Uppskotið frá starvsstjórnini hevði eitt avlop uppá 28,4 mia. ISK (~ 1,8 mia. DKK).

Tá fíggjarlógaruppskotið varð samtykt 22. desember, vóru nakrar broytingar gjørdar og útreiðslurnar øktust við 12 mia. ISK á hesum økjum:

- Heilsumál øktist við 5,2 mia. ISK
- Samferðsla øktist við 4,6 mia. ISK
- Mentamál øktist við 1,7 mia. ISK og
- Løgreglan og vaktar- og bjargingartænastan øktist við 0,5 mia. ISK

Sostatt lækkaði avlopið úr 28,4 mia. ISK niður í 16,4 mia. ISK (~1 mia. DKK). Hetta er fjórða árið á rað, at fíggjarlógin hevur avlop. Roknast kann við, at ein komandi samgonga fer at fremja broytingar á inntøku- og útreiðslusíðuni við einari eykajáttanarlóg tíðliga í 2017, so politikkurin hjá komandi samgongu kemur at síggjast aftur í fíggjarlógini.

Almenna bruttoskuldin lækkar úr 60% av BTÚ í 2015 niður í 39% av BTÚ í 2017. Við ársenda í 2021, væntast hon at vera 29% av BTÚ. Samstundis fara rentuútreiðslurnar úr 79 mia. ISK í 2015 til 69 mia. ISK í 2017.

Fyrsta januar 2017 broytist landsskattastigin frá trimum til tvey stig. Gistingarhússkatturin hækkar úr 100 ISK til 300 ISK (~19 DKK) fyri hvørja nátt. Gjaldið hevur verið óbroytt síðan 2012, tá ið skipanin kom í gildi. Hóast gistingarhússkatturin er 19 DKK fyri náttina, so vóru tað góðar 6,5 mió. gistingar í 2015. Í 2016 og 2017 væntast væl fleiri gistingar.

*Sí meira her (á enskum)*

## FISKIMENN HAVA VRAKAÐ SÁTTMÁLAN OG FLOTIN LIGGUR



*Mynd 8. Vegna verkfall liggur fiskiflotin.*

14. desember var freistin úti hjá sjómonnum kring landið, at atkvøða við uratkvøðu. Atkvøðast skuldi um sáttmálan, sum varð gjørdur í november mánaði fyri allar sjómenn. Síðsti sáttmálin hjá sjómonnunum gekk út í 2011, og teir hava sostatt verið uttan sáttmála í 5 ár. Hjá Sjómannasambandi Íslands vóru 76% sum atkvøddu ímóti, meðan tað vóru 86% sum atkvøðu ímóti í Sjómannafelagi Íslands. Verkfall hevur síðani verið og fiskiflotin hevur nú ligið í tríggjar vikur. Tað eru bert smærri bátar, sum landa fisk í løtuni. Tá útboðið er so lítið, so veksur prísurin. Í seinastuni hevur prísurin á toski og hýsu næstan verið tvífaldaður. Mett verður, at missurin er umleið 500 mió. ISK (~31 mió. DKK) dagliga í útflutningsvirði. Felagið fyri reiðarar og virkiseigarar stúra fyri, at tað kann verða trupult at vinna teir marknaðir aftur, sum ikki er gjørligt at veita feskan fisk í løtuni. Partarnir hittast aftur hjá semingsmanninum fyrst í nýggja árinum.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## ÍSLAND FEKK RINGASTA PISA ÚRSLIT SÍÐAN 2006




*Mynd 9. PISA úrslitini hjá Íslandi síðan 2000.*

Heimild: Menntamálastofnun

Ísland er undir miðal í OECD londunum, í trimum av PISA tættunum, sum mett var um. Í støddfrøði, náttúruvísindi og lesing eru íslendskir næmingar bara farnir niðureftir síðan 2006. Hinvegin er tó stór javnstøða millum kynini í PISA úrslitinum. Arnór Guðmundsson, stjóri í Mentamálastovninum, sum er stovnur undir mentamálaráðnum, sigur at hetta er ein stór broyting í støðinum hjá næmingunum, og at hon hevur ongantíð verið so vánalig í øllum trimum PISA tættunum í senn.
PISA kanningin vísir, at støðið í náttúruvísindi er fallin nógv síðstu 10 árini, støddfrøði støðið er fallið stútt síðan 2003, meðan lesing er fallið millum 2000 og

2006, og síðan hevur tað nærum staðið í stað. Sammett við Norðurlond, er Ísland niðast á øllum trimum økjum, støddfrøði, lesing og náttúruvísind.
Mett verður, at orsøkirnar til hetta kunnu vera, at kommunurnar, sum hava ábyrgd av fólkaskúlanum, hava raðfest ymiskt, lesiætlanirnar ikki eru nóg málrættaðar (vórðu broyttar fyri nøkrum árum síðan) og broytta læraraútbúgvingin ikki er nóg fakliga fokuserandi. Tað hevur víst seg, at greitt samband er millum PISA úrslitið hjá skúlunum og raðfestingina hjá kommununum.
Í Føroyum hava úrslitini stórt sæð bert gingið fram síðan 2006, men hóast tað, so eru tey nústani við at røkka lækkaða stigið hjá Íslandi í 2015, tó burtursæð frá náttúruvísindi, har stigið í Føroyum er væl lægri.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## FLEIRI FERÐAFÓLK UM VETURIN ENN UM SUMMARIÐ




*Mynd 10. Ferðafólkastreymurin javnast javnt út yvir alt árið.*

Ein av størstu avbjóðingunum innan ferðavinnuna er at fáa nóg mikið av ferðafólki alt árið, og hesa verkætlan hevur íslendska ferðaráðið arbeitt nógv við. Tað hevur nú givið úrslit. Isavia, sum er íslendskt felag, ið tekur sær av ferðaflutningi, væntar at talið av ferðafólki fer at vera mest um vetrarmánaðirnar í 2017. Forsøgnir spáa at ferðafólkatalið fer at vaksa við 440.000, og verður sostatt meira enn 2,2 mió. fólk í 2017, ein vøkstur uppá 25% frá 2016.
Verkætlanin, at fáa fleiri fólk um veturin, byrjaði í 2010, tá 50% av ferðafólki kom um summarið, meðan 23% kom um veturin. Í 2017 væntar Isavia, at 33% koma í summarmánaðunum juni – august, meðan 35% koma í vetrarmánaðunum november – mars. Hetta stendst av, at í 2010 vóru einans 2 feløg, sum flugu alt árið til Íslands, meðan 11 flogfeløg hava flogið alt árið til Íslands í 2016. Fleiri enn 25 flogfeløg flúgva annars til Íslands og fleiri leggjast afturat. Í 2017 byrjar Finnair at flúgva til Íslands. Vøksturin um mánaðin, var  17% í summarmánaðunum, meðan vøksturin í januar væntandi verður 74% og februar verður 54%.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## NOVEMBER OG DESEMBER SETA MET Í FERÐAFÓLKATALI




*Mynd 11. Ferðafólk í desember mánaði seinastu 7 árini.*

Tað vóru yvir 132.000 útlendsk ferðafólk, sum ferðaðust um Keflavík flogvøllin í november mánaða í ár. Hetta er ein vøkstur uppá 61,4% samanborið við november í 2015. Í desember mánaði vóru tað knappliga 125.000 útlendsk ferðafólk ella ein vøkstur uppá 76% í mun til desember mánað árið fyri. Bretar standa fyri 27% av ferðafólkunum, meðan 20% koma úr Amerika í desember mánaði.

Tilsamans hava 1,8 milliónir útlendsk ferðafólk ferðast um flogvøllin frá januar til desember í 2016. Tað er ein vøkstur uppá 40%  í mun til 2015. Um 50% av ferðafólkunum komu úr Bretlandi og USA.

*Meira her (á íslendskum við fleiri áhugaverdur talvum)*

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook